# Víðkað við tapti og búnyttum


*Nýggja sektiónin av Kvik ber nú heitið Kvik-inside*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Kvik-køkssentrið víðkar nú handilin til eisini at umfata annað enn "bara" køkar**

HANDIL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani Hans Michael Hansen fyri fimm árum síðani tók yvir umboðið fyri Kvik-køkar í Føroyum, hevur handilin verið fyri støðugum vøkstri.

Leygardagin verður so talan um næstu víðkanina av virkseminum, tá handilin við Staravegin eisini kemur at umfata sølu av køksbúnyttum, pyntilutum og mótatapeti. Ikki minst hetta seinasta tykist vera nakað, sum Hans Michael sjálvur er sera spentur uppá.

– Vit hava í øllum førum merkt, at hetta er nakað av tí, sum fólk hava sóknast eftir seinastu tíðina, og tí halda vit hetta vera ein náttúrligur partur, nú vit fóru undir at víðka um handilin.

## Halda fast um kjarnuøkið

Um víðkanina av virkseminum sigur Hans Michael, at hann sær hetta sum ein neyðugan lut, um virksemið skal haldast á einum nøktandi støði.

– Føroyar eru kanska í minna lagi til at hava veruligar serhandlar. Tað verður helst framvegis so, at søla av køkum verður høvuðsvirksemið hjá okkum. Men fyri at tryggja eitt betri støðufesti, er eisini neyðugt, at virksemið verður víðkað til eisini at umfata aðrar aktivitetir.

– Hinvegin eru hesir aktivitetir ikki so langt frá tí, sum vit hava fingist við. Køksbúnyttir, pyntilutir, borð og stólar eru væl nakað, sum er náttúrligt at hyggja at, tá køkar verða keyptir, og tí flyta vit okkum ikki so nógv frá kjarnuøkinum, sum vandi annars kundi verið fyri.

Nú handilin er víðakður, fevnir samlaða gólvvíddin hjá Kvik Køkum og Kvik-inside um 250 fermeterar.







BUSSFERÐ TIL ÍSLANDS

Vit fara aftur í summar at skipað fyri einari av teimum vælumtóktu bussferðunum til Íslands. Grannin fyri norðan hevur meira at bjóða føroyingum, enn vit halda. Frá nýmótans Reykjavík við handlum, matstovum og náttklubbum til ta avbera vøkru náttúruna og villa og stórbara landslagið. Síggið jøklar, lavalandsløg, áir og skiftandi náttúru. Baðið í vælgerandi heitum keldum og síggið goskeldur spræna.

Prísur fyri hvønn kr. 9.700,-

Íroknað kostnaðin er: Ferðin fram og aftur í 4 koyggjukamari við wc/bað innv. Hartil 7 gistingar í dupultkømurum á hotellum í Íslandi. Morgunmatur og døgurði (2-rættir). Bussur og ferðaleiðari.
Eykaprísur fyri 2 koyggjukamar við wc/bað: kr. 688,-
Einakamar á hotellunum: kr. 2.870,-

FERÐASKRÁIN ER HENDA:

**Mikudagur 23.08:**
kl. 18.00 fráferð av Havnini.
kl. 18.30 kunnandi fundur saman við ferðaleiðarunum í Viking Club.

**Hósdagur 24.08:**
Komið verður til Seyðisfjarðar kl. 08.00. Eftir tollavgreiðslu verður koyrt beinleiðis til Akureyrar (292 km). Steðga verður við eitt nú Mývatn og Goðafoss. Á Akureyri verður gist á Hotel Harpa ella Hotel Norðurland.

**Fríggjadagur 25.08:**
Koyrt verðir til Reykjavíkar (389 km). Í Borgarfirði verður steðga við m.a. Deildartunguhver og í Reykjaholti har Snorri Sturluson búði í 13. øld. Í Reykjavík verður gist á Fosshótel Barón.

**Leygardagur 26.08:**
Vitja verður Bláa Lónið og áhugaverd støð í Reykjavík m.a. Perluna, Hallgrímskirkjuna og Norræna Húsið.

**Sunnudagur 27.08:**
Útferð til Tingvalla, Gullfoss, Geysir, Skálholt og Hveragerði.

**Mánadagur 28.08:**
Frídagur

**Týsdagur 29.08:**
Vit siga farvæl við Reykjavík og gongur leiðin til Skaftafellar á Suðurlandinum (327 km). Hetta er ein long leið og verður steðga fleiri ferðir á vegnum. Her gista vit á Hotel Skaftafell.

**Mikudagur 30.08:**
Koyrt verður frá Skaftafell til Breiðdalsvíkar (220 km). Á vegnum steðga vit í Støðvarfirði har vit síggja eitt sera kent steinasavn. Vit koyra framvið Vattarnes har føroyingar vóru fyrr til lands. Seinastu náttina verður gist á Hotel Staðarborg í Breiðdalsvík.

**Hósdagur 31.08:**
Tíðliga ella eftir at morgunmatur er etin verður koyrt beinleiðus yvir Egilsstaðar til Seyðisfjarðar (109 km). Kl. 12.00 siglir Norröna av Seyðisfirði.

**Fríggjadagur 01.09:**
Kl. 05.00 koma á Havnina.


# Forvitnislig várframsýning í Orkis


*Danin Bo Buller vísti hóskvøldið ymisk hugskot til borðpynt og annað*

FRAMSÝNING
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Fermingarborð, brúðleypsborð, móttøkuborð, føðingardagsborð, dópsborð, páskaborð…Blómuhandilin Orkis á Glyvrum er í hesum døgum karmur um eina sera hugnaliga framsýning við nógvum ymiskum prýðislutum og hugskotum.

Blómuhandilin Orkis hevur í hesum døgum eina forkunnuga framsýning í handilshølunum á Glyvrum, har seinasta rákið innan pynt av ymiskum slagi verður víst.

Framsýningin lat upp hóskvøldið, tá ið Orkis skipaði fyri einum almennum íblástrarkvøldi, har danin Bo Bull tosaði um alt tað nýggjasta innan pynt, og gav hugskot til fermingarborð, brúðleypsborð og ymiskt annað. Nógv fólk var til tiltakið, og tey hugnaðu sær óført. Í samband við framsýningina skipar Orkis eisini fyri eini kapping, har møguleiki er at vinna gávukort frá handlinum, umframt eina uttanlandsferð frá Fonn Flog.

Á Framsýningini eru fleiri ymisk borð, sum eru prýdd við tí seinasta nýggja innan borðpynt. Hóast Orkis er ein blómuhandil, so er nógv annað enn blómur á framsýningini. Til dømis er eitt brúdleypsborð við brúðarkøku, brúðarkjóla o.ø.

Tað mest sermerkta borðið á framsýningini er óivað undirsjóvartunlaborðið, sum er prýtt við ymiskum tirnum o.ø., sum er komið úr Norðoyartunnilinum. Framsýningin verður opin til og við 29. mars, og er avgjørt verd at vitja.